Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

Bech-Bruun
Langelinie Allé 35
2100 København Ø

**Att.: Mark Gall, adv.**

**Tórshavn 13. mai 2013**

Journal nr.: 13/00035-9
Viðgjørt: S.R.

**Avgerð um góðkenning eftir einfalda viðgerð**

Kappingareftirlitið fekk tann 24. januar 2013 fráboðan um, at Norges Gruppen Aps hevði í umbúnað at yvirtaka Dagrofa A/S saman við einum verandi partaeigara. Fráboðanin var fullfíggjað tann 19. apríl 2013.

Talan er um eina yvirtøku sambært §13, stk. 1 nr. 2 í kappingarlógini, tí ræðisbroyting er farin fram. Við yvirtøkuni av partapeninginum fær Norges Gruppen Aps saman við verandi partaeigara, KFI Grunninum, felagsræði á Dagrofa A/S.

Yvirtøkan kemur undir fráboðanarskylduna í §16, stk. 1, tí markvirðini í §14, stk. 1, nr. 2 eru nádd. Sambært §14, stk. 1, nr. 2 skal minst ein fyritøku hava ein umsetning á 75 mió. kr. í Føroyum, meðan onnur fyritøka skal hava minst 75 mió. kr. á heimsstigi. Dagrofa A/S hevur ein umsetning í Føroyum, sum liggur omanfyri føroyska markvirði, meðan Norges Gruppen Aps hevur ein umsetning, sum liggur omanfyri globala markvirðið. Yvirtøkan er fráboðað í Føroyum, Danmark og Grønlandi.

Yvirtøkan fer fram á tann hátt, at Norges Gruppen Aps yvirtekur 47% av partabrøvunum í Dagrofa A/S frá Skandinavisk Holding A/S. KFI Grunnurin kemur at eiga 41%, meðan tey eftirverandi 12% koma sjálvstøðugir SuperBest- og Sparkeypmenn at eiga. Ognar býti og aðrar bindingar millum Norges Gruppen Aps og KFI Grunnin merkja, at hesir partar frameftir hava felagsræði á Dagrofa A/S.

Dagrofa A/S hevur virksemi innan heilsølu og smásølu av gerandisvørum. Føroyska virksemi er avmarkað til heilsølu av gerandisvørum til føroyskar heilsølur og stórkeypmenn. Hesir hava havt høvi til at koma við viðmerkingum til yvirtøkuna.

Talan er um eina yvirtøku, sum kemur undir §3, stk. 1, nr. 4 í reglugerð nr. 2 frá 20 juli 2012, og er tí fráboðað eftir einfaldum leisti. Við støði í teimum upplýsingum sum fráboðari er komin við, metir Kappingareftirlitið, at yvirtøkan ikki gevur orsøk til ivasemi, og hevur tí avgjørt at góðkenna yvirtøkuna eftir einfalda málsviðgerð, sbrt. § 15, stk. 5 í kappingarlógini.

Góðkenningin er givin treytað av, at tær upplýsingar sum luttakandi fyritøkurnar hava givið eru rættar, sbrt. § 18a , stk. 3 í kappingarlógini.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
deildarstjóri

Sigurd Rasmussen
fulltrúi